## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fyrrapartin fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sól. Hitin um frostmarkið. Seinnapartin frískar hann vindin av útsynningi og um kvøldið upp í skrið og regn. Hitin kemur upp í 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Skrið ella stormur av útsynningi og stundum regn. Hitin millum 3 og 6 stig. Út á seinnapartin hvassur vindur av vestri og ælingur, partvís kavi. Hitin fellur niður móti frostmarkinum.




**Veðrið fríggjadagin:**
Strúkur í vindi av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men mjørki í støðum. Hitin millum 5 og 9 stig.

Shakespeare´s Macbeth:

# Unikt og livandi

*Katarina Nolsøe er annar av føroysku leikaranum í Macbeth hjá Shakespeare. Hans Tórgarð spælir Macbeth sjálvur. Annars eru fýra aðrir útlendskir leikarar við*
*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Macbeth, tann blóðugasti og stytsti leikurin, ið Shakespeare hevur skrivað, verður fríggjadagin at síggja á føroyskum leikpalli. Bæði føroyskir og útlendskir leikarar eru við, høvuðsmálið er svenskt, men føroyskt og norskt er eisini við í leikinum**

SJÓNLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*

Umframt teir føroysku leikararnar, Hans Tórgarð og Katarinu Nolsøe, eru fýra aðrir leikarar við, sum koma frá ávíkavist, Svøríki, Finlandi og Noregi. Leikurin verður frumframførdur fríggjadagin, og lova sjónleikararnir eina unikka og spennandi sýning.

– Alt byrjaði tá fýra ungir mans úr Føroyum, Noregi, Svøríki og Finlandi, undir fyrsta NorMa árinum, sum er eitt projekt ár á tí svensku deildini við leiklistarskúlan í Helsingfors, fóru at hugsa um at gera okkurt saman, sigur Anders Kippersund úr Noregi, sum spælir Macduff og aðrar minni leiklutir í Macbeth.

– Hetta hevur verið eitt hart arbeiði, sum hevur tikið langa tíð. Vit byrjaðu av fyrstan tíð fyri fýra árum síðani, og bara at vit eru komin so langt, sum vit eru komin nú er ógvuliga gott.

### Rundferð

Hetta er triðja ferðin teir seks leikararnir eru savnaðir í Føroyum. Leikararnir siga seg hava verið ígjøgnum alt frá eufori til vónloysi, men nú leikurin er komin so væl ávegis siga teir seg verða klárar til at skelka sjónleikaheimin. Ein øðrvísi og úrvald sýning verður sagt.

Tulkingin av sjónleikinum er teirra egna. Føroyska týðingin hjá Axel Tórgarð er brúkt, sum grundarlag, men høvuðsmálið er svenskt, men leikurin hevur eisini føroysk brot í.

Sjónleikararnir skulu eisini á eina stóra rundferð í Svøríki, Noregi og Finnlandi við sjónleikinum.

– Hetta er stórt í sær sjálvum, at fáa útlendskar leikarar til Føroya, sigur Katarina Nolsøe, sum millum annað spælir Lady Macbeth. – Vit hava havt ein ógvuliga dugnaligan leikstjóra, og hetta er nakað, vit virkuliga vilja geva áskoðarunum. Og um fólkini eru fyrireikaði uppá, at hetta er øðrvísi, so trúgvi eg, at tey kunnu fáa eitt ógvuliga gott upplivilsi.

Macbeth verður frumframførdur fríggjadagin, og fyri fyrst eru fýra sýningar á skránni. Um áhugi vísir seg at vera fyri sýningunum verða fleiri sýningar settar á skránna.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷22 |
| Nuuk | ÷11 |
| Qaqortoq | ÷7 |
| Ammassalik | ÷10 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 6 |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 2 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 12 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 2 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 2 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 8 |
| Warzawa | 6 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 9 |
| Róm | – |
| Malorca | 15 |
| Athen | 13 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 18 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 26 |
| Sydney | – |
| New York | 1 |
| Miami | 21 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 31 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 981 hPa. vestan fyri Skotland grynnist.




Hátrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing og ein hátrýstryggur til Føroya fer eystureftir. Eitt djúpt lágtrýst yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum við nógvum vindi og regni.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/02 kl. 06⁰⁰– 12/02 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,2°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,7 mm – mált frá 11/02 kl. 06⁰⁰– 12/02 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 71,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

12. februar: Tendring
14. februar: Mánin longst frá jørðini
20. februar: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | Suðuroyar—/ Vágafirði sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna—sundi fp. | Vestmanna—sundi sp. | Mykines—firði fp. | Mykines—firði sp. | Nólsoyar—firði fp. | Nólsoyar—firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna—sundi fp. | Hvanna—sundi sp. | Fugloyar—firði fp. | Fugloyar—firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. feb | 07.39 | 20.01 | 06.39 | 19.01 | 06.54 | 19.16 | 09.39 | 22.01 | 10.39 | 23.01 | 05.54 | 18.16 | 04.54 | 17.16 | 07.54 | 20.16 | 08.54 | 21.16 | 07.24 | 19.46 | 08.39 | 21.01 |
| 14. feb | 08.22 | 20.43 | 07.22 | 19.43 | 07.37 | 19.58 | 10.22 | 22.43 | 11.22 | 23.43 | 06.37 | 18.58 | 05.37 | 17.58 | 08.37 | 20.58 | 09.37 | 21.58 | 08.07 | 20.28 | 09.22 | 21.43 |
| 15. feb | 09.00 | 21.17 | 08.00 | 20.17 | 08.15 | 20.32 | 11.00 | 23.17 | — | 12.00 | 07.15 | 19.32 | 06.15 | 18.32 | 09.15 | 21.32 | 10.15 | 22.32 | 08.45 | 21.02 | 10.00 | 22.17 |
| 16. feb | 09.34 | 21.52 | 08.34 | 20.52 | 08.49 | 21.07 | 11.34 | 23.52 | 00.17 | 12.34 | 07.49 | 20.07 | 06.49 | 19.07 | 09.49 | 22.07 | 10.49 | 23.07 | 09.19 | 21.37 | 10.34 | 22.52 |

5 707265 100036 >